**UTTAN ÚR HEIMI**

## Stjórnin trýsti fjølmiðlarnar

Kenda amerikanska sjónvarpskvinnan Christiane Amanpour vil vera við, at stjórnin hjá George W. Bush, forseta gav amerikonsku fjølmiðlunum munnkurv undir krígnum í Irak, og at fjølmiðlarnir áløgdu sær sjálvum neyvt eftirlit við, hvørji tíðindi teir bóru frá krígnum.

Christiane Amanpour, sum arbeiðir hjá sjónvarpinum CNN, sigur í samrøðu við sjónvarpið CNBC, at allar tær amerikonsku sjónvarpsstøðirnar skalaðu fyri trýstinum frá stjórnini. Hon dylir ikki fyri, at eftir hennara tykki fór sjónvarpið Fox News serliga langt og bar at kalla bara tey tíðindi frá krígnum, sum hóvaðu stjórnini.

Leiðslan í CNN er ikki serliga fegin um orðini hjá tí kenda medarbeiðaranum. Tíðindastjórin hjá CNN, Jim Walton, sigur, at Christiane Amanpour er eitt av heimsins bestu tíðindafólkum, men hann er kortini ikki samdur við hugsanum hennara um viðurskiftini millum stjórnina og fjølmiðlarnar undir krígnum í Irak.

## Generalur vil verða forseti

Fyrrverandi amerikanski generalurin Wesley Clark ætlar at royna at gera valevni hjá demokratunum til forsetavalið í USA næsta ár.

Wesley Clark var ovasti fyri NATO-deildunum í krígnum í Bosnia í 1999. Hann hevur alla sína tíð arbeitt í amerikanska herinum, og eygleiðarar halda, at verður hann tað endaliga valevnið hjá demokratunum, kann hann hótta George W. Bush, forseta, sum fegin vil verða afturvaldur.

Týsdagin kunngjørdi senatorurin John Edwards, at hann ætlar sær at royna at gerast valevni hjá demokratunum, og ger Wesley Clark álvara av ætlan síni, fáa demokratarnir ikki færri enn tíggju valevni at velja ímillum, tá teir næsta ár skulu taka støðu til, hvønn teir skulu stilla upp ímóti Bush.

## Vilja hava jarnbreyt

Vinnulívsfólk í Norðurnoregi og Norðurrusslandi hava skotið upp at gera eina jarnbreyt um markið.

Skotið verður upp at gera eina jarnbreyt millum norska býin Kirkenes og russiska býin Zapoljarnyj og at nútímansgera jarnbreytina millum Zapoljarnyj og Murmansk. Verkætlanin er mett at kosta 1,3 milliard krónur, men íløgan er skilagóð, siga vinnulívsfólkini, sum vænta, at tann nýggja leiðin fer at verða nógv býtt.

Talan er serliga um at nýta ta nýggju jarnbreytina til farmaflutning. Russiskar fyritøkur hava longu boðað frá, at tær eru sinnaðar at flyta timbur og olju eftir nýggju jarnbreytini, og býráðið í Kirkenes hevur søkt norsku myndugleikarnar um loyvi at gera eina oljuavskipingarhavn í býnum.

## Krevur stórt endurgjald

Tíggju dagar aftan á yvirgangsatsóknirnar at New York og Washington fyri tveimum árum síðani tóku bretsku myndugleikarnir Lotfi Raissi og skuldsettu hann fyri at hava verið uppi í at fyrireika atsóknirnar.

Tað vóru amerikonsku myndugleikarnir, sum bóðu bretar handtaka mannin, men amerikanararnir kundu ikki prógva, at hann hevði havt nakað við atsóknirnar at gera, og maðurin varð tí latin leysur. Nú krevur Lotfi Raissi, at amerikonsku myndugleikarnir skulu rinda honum 12,5 milliónir dollarar í endurgjaldi fyri teir fimm mánaðarnar, hann sat í varðhaldi í London. Kona hansara sat í varðhaldi í tríggjar dagar, og ein bróður hansara noyddist fimm dagar í varðhald.

Lotfi Raissi sigur við BBC, at amerikanska skuldsetingin hevur havt nógvar avleiðingar við sær. Eitt nú sleppur hann ikki at flúgva longur, tí einki flogfelag vil vita av honum.

# 1200 fara at minnast Onnu Lindh

**Fleiri útlendskir politikarar og ríkisleiðarar fara at minnast myrda svenska uttanríkisráðharran á einum minningarhaldi í morgin**

MINNINGARHALD

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Í morgin savnast umleið 1200 politiskir vinir og stravsfelagar hjá Onnu Lindh í tí bláa salinum á ráðhúsinum í Stockholm at minnast kvinnuna, sum sambært Gøran Persson, forsætisráðharra var tað svenska andlitið móti umheiminum.

Svenska stjórnin og Ríkisdagurin verða sum vera man væl umboðað á minningarhaldinum, men harumframt koma uttanríkisráðharrar og ríkisleiðarar úr nógvum londum til Stockholm í morgin.

Millum gestirnar verður amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell. Hann hevur lýst Onnu Lindh sum eina sera ágrýtna kvinnu, sum setti sín dám á altjóða diplomatiið og á sambandið tvørtur um Atlantshavið.

# Fyrireika seg til Isabel



*Í fleiri amerikonskum eysturstatum hava fólk fyrireikað seg til ódnina Isabel, sum sambært veðurmonnunum fer at bera við land í dag. Tær seinastu kanningarnar hava kortini víst, at ódnin er ikki so ring nú sum upprunaliga, men at hon kortini kann fara at gera stóran skaða á landi*

*Mynd: Reuters*

# Bretska fólkaatkvøðan um evruna útsett

**Nú sviar hava vrakað evruna, er lítið, sum bendir á, at Tony Blair kann fáa bretsku veljararnar at velja hana ístaðin fyri pundið. Í hvussu er ikki í bræði**

BRETLAND

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Sambært Financial Times hevur Tony Blair, forsætisráðharri sagt við sínar ráðharrar, at teir eiga ikki at sleppa vónini um, at stjórnin fer at skriva út fólkaatkvøðu um evruna um eitt ella tvey ár.

Men eygleiðarar í London siga tað vera lítið sannlíkt, at bretar fara at velja evruna fyrr enn í fyrsta lagi um fýra ár. Teir vísa á, at avgerðin hjá svium at vraka evruna ger tað politiskt ógjørligt hjá Blair og stjórnini at fáa meirilutan av bretsku veljarunum at góðtaka evruna í bræði.

Tey, sum mæla bretum til at taka evruna ístaðin fyri pundið, hava sambært eygleiðarunum ásannað støðuna og tosa nú um at steðga við fólkaatkvøðuni til aftan á næsta parlamentsvalið, sum verður í 2006.

Danmark, Svøríki og Bretland hava ikki evruna, men meðan danir og sviar hava sagt nei á fólkaatkvøðu, hava bretar ongantíð sagt sína hugsan enn. Men sambært meiningakanningunum hevur Blair onga orsøk til at skunda sær, tí tær vísa, at umleið 70 prosent av veljarunum vilja varðveita pundið.

# Í Stakkin eftir veðrum



Um tað viðrar leygardagin, fara tjørnuvíkingar í Stakkin eftir veðrum.

Tað verður gjørt eitt sindur burtur úr hesum degnum, og byrjað verður kl. 7.30 leygarmorgunin, tá ið formaðurin bjóðar vælkomin. Nøkur sálmaørindi verða sungin, og so verður farið til gongu.

Manningin plagar at vera eini 35 mans, og vanligt er, at teir koma aftur um middagsleitið. Tá verður takkarørindi sungið.

Síðani verður boðið til døgurða í bygardhúsinum, og aftaná verður farið at fletta.

Í ár eru seks veðrar at taka, og teir verða seldir á uppboðssølu kl. 17.00. Harafturat verða eisini nakrir grýtuklárir lundar seldir.

Ein av veðrunum verður burturlutaður í lutaseðlasølu, og ein veðrur verður seldur í stykkjum. Hinir fýra veðrarnir verða seldir livandi.

Seyðurin í Stakkinum er góður, og í ár einki undantak, siga menn. Á ólvasøku vóru teir allir sera prúðir.

Peningurin, sum kemur inn frá tiltakinum, fer til at halda Stakkin.

Veðrið er umráðandi ein slíkan dag, men har skuldi alt verið í besta lagi, tí veðurmenninir lova gott veður, og ættin er tann besta í Tjørnuvík.

Dagurin endar við dansi í bygdarhúsinum, har Trio av Tvøroyri spælir.

